









**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3223

Navn: Sp/f Norðlýsið
Adressa: Rygsvegur 3, 700 Klaksvík

Kommuna: Klaksvíkar Kommuna
Stovningardato: 15.08.2001
Viðtøkudato: 15.08.2001
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnarar: Oliver Joensen, Rygsvegur 3, 700 Klaksvík og Elsa Thomina Biskopstø Joensen, 700 Klaksvík.
Stjórn: Oliver Joensen, Rygsvegur 3, 700 Klaksvík og Elsa Thomina Biskopstø Joensen, Rygsvegur 3, 700 Klaksvík.
Tekningarreglur: Felagið verður bundið við undirskrift av einum stjóra.
Grannskoðari: : Sp/f Agnar á Dul, Gerðagøta 31, 700 Klaksvík.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 15.08.2001 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er: Blaðútgáva og annað virksemi í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 23. august 2001

Kristin Balle

Norðurlandahúsið í Føroyum
Sí SVF tekstvarp s. 650





**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3213

Navn: Sp/f Atlantic Online
Adressa: 530 Fuglafjørður

Kommuna: Fuglafjarðar Kommuna
Stovningardato: 04.07.2001
Viðtøkudato: 04.07.2001
Kapitalur: Kr. 250.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 250.000,00 til kurs 100.
Stovnarar: Robert Giehm, Millum Gilja 33, 188 Hoyvík, Jóhan Joensen, 530 Fuglafjørður, Johan Heri Joensen, 530 Fuglafjørður, Bogi Lervig, 530 Fuglafjørður og Jón Nolsøe Olsen, Kambsdalur, 530 Fuglafjørður.
Nevnd: Robert Giehm, Millum Gilja 33, 188 Hoyvík (formaður), Jóhan Joensen, 530 Fuglafjørður, Johan Heri Joensen, 530 Fuglafjørður, Bogi Lervig, 530 Fuglafjørður og Jón Nolsøe Olsen, Kambsdalur, 530 Fuglafjørður.
Stjórn: Jóhan Joensen, 530 Fuglafjøður.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóranum ella nevndarformanninum ella 2 nevndarlimum.
Grannskoðari: : Sp/f Grannskoðarastovan á Skála, 480 Skála.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 04.07.2001 - 31.12.2001
Endamál: Endamál felagsins er at reka handil, fjarskiftistænastu- og kervi o.a. í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 22. august 2001

Kristin Balle





Tíðindablaðið
sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið *5 ferðir um vikuna.*

Navn:
Búst.:
Postnr., bygd, býur:
Tlf.:
Undirskrift:

Sosialurin -har tað hendir




# Spennandi ráðstevna um psykiatri í Føroyum



**Hósdagin byrjar stór ráðstevna í Føroyum fyri psykiatriskar sjúkrasystrar úr øllum Norðurlondum. Jóhanna Andreasen er ein av fyriskiparunum, og hon heldur, at ráðstevnan hevur nógv áhugavert at bjóða. M.a. fer Tórmóð Stórá at hava fyrilestur um sjálvmorð í Føroyum**

RÁÐSTEVNA
*Stefan í Skorini*

Tær eru við at leggja seinastu hond á verkið, nú stóra ráðstevnan stendur fyri durum. Tað er felagið fyri psykiatriskar sjúkrasystrar í Føroyum, ið skipar fyri ráðstevnuni, sum byrjar hósmorgunin.

Væntandi vera eini 400 luttakarar úr øllum Norðurlondum við á stevnuni, sum verður í Norðurlandahúsinum. Hetta er fyrstu ferð, at slík ráðstevna er í Føroyum, og tí eru sjúkrasystrarnar spentar um, hvussu hetta fer at spæla av.

## Fjølbroytt ráðstevna

Jóhanna Andreasen er formaður í nevndini hjá felagnum fyri psykiatriskar sjúkrasystrar, og tað er nevndin, sum hevur staðið fyri fyrireikingunum.

Hon sigur, at tey hava lagt seg eftir at hava eina so fjølbroytta ráðstevnu sum til ber. Hon heldur tað vera týdningarmikið, at hava nógv ymiskt at bjóða, so at luttakararnir allatíðina hava okkurt nýtt at hugsa um.

Tað vera fleiri fyrilestrar á skránni. Ein tann mest áhugaverdi fyrilesturin er hjá Tórmóð Stórá. Hann lesur til sálarlækna, og hann hevur í hesum sambandi skrivað eina ritgerð um sjálvmorð í Føroyum.

Hann fer at leggja úrslitini fram á ráðstevnuni, og tað verður áhugavert hjá føroysku luttakarunum eins og hjá teimum útlendsku at síggja, hvussu støðan er í Føroyum hesum viðvíkjandi.

August Wang gjørdi eina ritgerð um sama evni fyri nøkrum árum síðani, og Tórmóð hevur síðani arbeitt víðari við hesum. Hann hevur granskað aldurin, kynið og hvar í landinum tey búgva, ið hava tikið lívið av sær sjálvum.

Ein annar áhugaverdur fyrilestrahaldari er Allan Holmgren. Hann finst serliga at viðgerðarhættunum, ið nýttir vera í dag. Hann sigur, at sálarliga sjúk fólk ikki bara skulu hava eina diagnosu og síðani hava heilivág, men teimum skal eisini verða givin ein vón um at gerast frísk. Holmgren heldur, at læknar í størri mun eiga at taka alla familjuna við í viðgerðina.

Allan Holmgren fer at hava ymisk áhugaverd innlegg. Millum annað fer hann at vísa sjónband frá sínum egnu viðgerðum við sjúklingum, og hann fer at vísa brot úr filminum Don Juan.

Umframt fyrilestrar verða eisini sokallaðir workshops. Her sleppa luttakararnir at royna seg í meira praktiskum arbeiði.

## Familjan

Heitið á stevnuni er »Familjan – ein møguleiki ella ein forðing«. Í hesum sambandi sigur Jóhanna, at familja hjá einum sálarliga sjúkum persóni kann bæði vera ein stuðul í at gerast frískur, men kann eisini vera eitt haft um beinið á tí sjúka.

Tí verður leikluturin hjá familjuni tikin til viðgerðar. Hon sigur, at tað sum heild næstan er bannað at tosa um sálarligar sjúkur í Føroyum. Fólk, ið eru innløgd, vilja ikki hava nakað samband við onnur, tí tað hetta er tabu.

Tað er hinvegin léttari hjá sjúklinginum at fáa bata, um tosað verður opið um trupulleikarnar. Felagið føroyskar psykiatriskar sjúkrasystar vilja við hesum tiltakinum hava størri viðurkenning í samfelagnum fyri sálarsjúkum, og at hesar eru at meta eins við aðrar kropsligar sjúkur.

Fyri at krydda ráðstevnuna hava fyrireikararnir fingið Edvard Fuglø at hava framsýningar við sínum verkum. Eisini fer Kári Sverrison at syngja og Hans Tórgarð fer at spæla leikin um Van Gogh.



*Norðurlandahúsið fer í næstum at vera karmur um stóra ráðstevnu fyri psykiatriskum sjúkrasystrum*

# Bergur førdi ikki pennin

RÆTTING
*Stefan í Skorini*

Í blaðnum í gjár stóð skrivað, at tað var Bergur Wardum, ið hevði skrivað greinina um Victor Carlsen í Oyggjatíðindum. Hetta er komið skeivt fyri, tí tað var ikki Bergur, ið skrivað hevði greinina. Vit biðja um umbering fyri mistakið. Greinin er nú fyri í rættinum, tí Victor Carlsen metir hana vera ærumeiðandi og vil tí hava greinina dømda deyða at vera.

Bergur Wardum vil eisini fegin hava greiði á sínum leikluti í rættinum. Hann sigur, at hann hevði játtað at stuðla Dan Klein í teimum formellu viðurskiftunum í sambandi við rættarmálið.



Orsøkin til at hann setti seg í vitnisstólin við revsiábyrgd var, at hann vildi hava dómaran at siga, at revsiváttanin hjá Dan Klein ikki fór at vera tikin við, tá dómarin skal gera úrskurð í málinum. Hetta fingu teir dómaran at ganga við til, at revsiváttanin hjá Dan ikki skal takast við í metingina.

Orsøkin til at teir vildu hava hesa staðfesting frá dómaranum er, at Dan Klein hevur eina tyngjandi revsiváttan í slíkum málum, og tí kundi revsingin verið harðari, um hon varð tikin við.

Bergur Wardum vil vera við, at hesir dómar ikki liva upp til krøvini í mannarættindayvirlýsingini, og tí kundu teir ikki nýtast sum grundarlag í hesum málinum.


